

# VEGURIN TIL

Tróndur Arge



## BÓLKASPÆL

### Bólkur A

| NR. | | D | V | J | T | MÁL | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Uruguay | 3 | 2 | 1 | 0 | 4 | 7 |
| 2 | Meksiko | 3 | 1 | 1 | 1 | 1 | 4 |
| 3 | Suðurafrika | 3 | 1 | 1 | 1 | -2 | 4 |
| 4 | Frakland | 3 | 0 | 1 | 2 | -3 | 1 |

### Bólkur C

| NR. | | D | V | J | T | MÁL | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | USA | 3 | 1 | 2 | 0 | 1 | 5 |
| 2 | Ongland | 3 | 1 | 2 | 0 | 1 | 5 |
| 3 | Slovenia | 3 | 1 | 1 | 1 | 0 | 4 |
| 4 | Algeria | 3 | 0 | 1 | 2 | -2 | 1 |

### Bólkur E

| NR. | | D | V | J | T | MÁL | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Hollan | 3 | 3 | 0 | 0 | 4 | 9 |
| 2 | Japan | 3 | 2 | 0 | 1 | 2 | 6 |
| 3 | Danmark | 3 | 1 | 0 | 2 | -3 | 3 |
| 4 | Kamerun | 3 | 0 | 0 | 3 | -3 | 0 |

### Bólkur G

| NR. | | D | V | J | T | MÁL | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Brasilia | 3 | 2 | 1 | 0 | 3 | 7 |
| 2 | Portugal | 3 | 1 | 2 | 0 | 7 | 5 |
| 3 | Fílabeinsstr. | 3 | 1 | 1 | 1 | 1 | 4 |
| 4 | Norður Korea | 3 | 0 | 0 | 3 | -11 | 0 |

## 1/8 FINALUR

**URUGUAY** - SUÐ. KOREA 2-1

USA - **GHANA** 1-2

**HOLLAND** - SLOVAKIA 2-1



**BRASILIA** - KILI 3-0

## 1/4 FINALUR

**URUGUAY** - GHANA 1-1

**HOLLAND** - BRASILIA 2-1

## HÁLV FINALUR

URUGUAY - **HOLLAND** 2-3

## FINALA





**HOLLAND**



# Spania vitjan í Føroyum

Spania var á vitjan í Føroyum í september mánað í 1996. Millum stóru leikararnir tá vóru Andonio Zubizarreta, Miguel Nadal, Sergi, Fernando Hierro, Luis Enrique, Raul, Kiko og ein ávísur Perez Munoz Alfonso.

Longu eftir tríggjar minuttir lá bólturin í málinum hjá Andonio Zubizarreta, men Jan Allan Müller var rangstaddur. Spania hevði bóltin nógv meira og teir komu eisini til fleiri møguleikar, men eitt nú Kiko og Juan Antonio Pizzi vóru ikki so neyvir hendan dagin á Svangaskarði.

Eftir 37. min kláraði ongin at steðga sponsku maskinuni, tá Luis Enrique saman við sínum landsmonnum spældu føroysku verjuna tunna. Tað endaði við, at Enrique kom at standa einsamallur framman fyri málinum og skoraði.

Bara ein minuttur var farin av seinna hálvleiki, tá føroyingar svaraðu aftur. John Petersen sendi Toda Jónsson avstað og við høgra beini smekkaði hann til. Zubizarreta hevði ongan møguleika í málinum og Føroyar høvdu javnað ímóti Spania á Svangasgarði. Fagnaðurin á viðhaldsfólkinum var eisini til at fáa eyga á.

Men so skifti Javier Clemente, venjari hjá Spania, Perez Munos Alfonso inn. Tað gekk bara ein lítil løta, so legði hann Spania á odda. Stutt eftir var Óli Johannesen óheppin og beindi bóltin í egið mál. Síðani megnaði føroyska landsliðið at standa ímóti, líka til sjey minuttir vóru eftir. Tá skoraði Alfonso aftur og legði Spania á odda 4-1. Síðani gekk skjótt, Fernando Hierro stútaði horna í mál til 5-1 og minuttir eftir skoraði Alfonso sítt triðja mál til 6-1.

Í tí klokkan fór um 90 minuttir, pyntaðu føroyingar um úrslitið. Innskiftið Símun Eliasen fann Una Arge, sum prikaði bóltin fram við Zubizarreta og málið til endaliga úrslitið 6-2 til Spania.